**Harra forseti, og frú Eliza**

Áfram Ísland!

Hetta íslendska herrópið rungaði í Føroyum seinasta summar. 100-tals føroyingar savnaðust fleiri kvøld mitt í høvuðsstaðnum at heppa á íslendsku ”straukarnar”, sum tóku øll á bóli undir EM-kappingini í Fraklandi.

Í Føroyum samgleddust vit við treystu og djørvu íslendingunum. Vit vóru errin, sum var tað okkara egna fótbóltslandslið. Tað var, sum um frálíku fótbóltsúrslitini styrktu okkara egnu sjálvsfatan: Kundu íslendingar, ja, so kunnu føroyingar eisini einaferð í framtíðini, hildu fleiri.

Í føroyska sjónvarpinum varð ein føroyingur spurdur, hvussu tað bar til, at so nógvir føroyingar kundu savnast fyri at heppa á eina aðra tjóð. Hann svaraði stutt og greitt: *Íslendingar eru okkara grannar – okkara blóð.*

Og tað er so satt, sum tað er sagt.

Valla er nøkur tjóð so nær skyld íslendingum, sum hin føroyska. Mentanarliga eru vit úr somu norrønu rót, mál, mentan og søga okkara er samantvinnað, og lívstreytir okkara í norðurhøvum líkjast nógv.

Føroyar og Ísland eru brøðratjóðir. Brøðratjóðir í orðsins sanna týdningi.

Sum brøðir er upphavið tað sama. Vit eru tætt knýtt. Vit eru væl. Vit samstarva. Vit stuðla hvørjum øðrum, tá ið á stendur. Og vit eru eisini kappingarneytar á fleiri økjum.

Á vinnuøkinum hava okkara vegir ofta runnið saman. Tað munnu vera fáar tjóðir, ið Føroyar hava samstarvað meira við enn Ísland á fiskivinnuøkinum. Og gjøgnum tíðina hava íslendingar fleiri ferðir átt týðandi partar av føroyskum vinnulívi. Men tað

er ikki bara fiskur, aliringar, handilsvørur, bankar, flutningur ella trol sum binda okkum saman.

Vanliga fólkið bindir okkum eisini saman. Seinnu árini hava fleiri føroyingar nomið sær útbúgving í Íslandi, onnur fingið sær heilsubót og onnur kent ágóðan av góðum samstarvi á mentanar-, ferðavinnu og granskingarøkinum.

Eisini í ítrótti hava vit knýtt bond. Nógvir íslendingar hava verið at sæð í føroyskum ítrótti gjøgnum tíðina, og eisini føroyingar hava roynt seg í Íslandi við góðum úrslitum, bæði í fótbólti og hondbólti. Fari eg ikki heilt skeivur, so hevur føroyski landsliðsmálverjin Gunnar Nielsen enntá vart málið hjá tínum liði, Stjarnan.

Nógvir íslendingar hava fest røtur í Føroyum. So nógvir, at tað bara eru fleiri danir enn íslendingar. Eg kann til stuttleikar nevna, at sambært hagtølunum hjá Manntali, búgva í alt 167 borgarar í Føroyum, sum hava íslendskan ríkisborgaraskap.

Eitt orðatak sigur, at systkin, sum tvíhalda um, at tey ongantíð keglast, hava uttan iva okkurt at fjala. Sum brøður og brøðratjóðir eru vit eisini ósamd. Áhugamálini hjá Føroyum og Íslandi minna nógv um hvørt annað, og tá er skjótt at gerast kappingarneyti.

Seinastu árini hava verið nøkur mál, ið vit hava verið ósamd um.

Hóast orðadrátturin stundum harðnar, so megna vit – sum systkin flest – at finna stevið aftur. Tað gleðist eg sjálvandi um.

Brøðralag kann rúma nógv. Tað kann vera vinsemi, samstarv og kapping.

Kapping kann ofta fáa tað besta fram í okkum. Bæði Føroyar og Ísland teljast í løtuni millum tey londini, ið standa seg best búskaparliga í øllum Evropa. Bæði londini eru komin væl undan herviligu fíggjarkreppuni og kunnu í dag fegnast um stóran vøkstur og framburð.

**Harra forseti, og frú Eliza**

Dýrabar virði eru í trúgvum vinalagi og góðum grannalagi. Tað hava føroyingar og íslendingar, hvør í sínum lagi, ofta ásannað og kent fløvan av.

Ofta hava vit verið sorgarbundin saman við tykkum, tá ið náttúrunnar veldigi máttur hevur gjørt um seg. Vit grótu saman við tykkum, tá ið eldgosið í Vestmannaoyggjunum í 1973 gjørdi um seg, og í 1995, tá ið tit vórðu rakt av ógvusligum skalvalopum á Flateyri og Suðavik. Eisini í 2008 kendu vit harm, tá ið fíggjarkreppan kollrendi íslendska samfelagið.

Trúgva vinalagið og góða grannalagið við Ísland hava vit føroyingar altíð virðismett.

Túsundtals føroyingar hava gjøgnum árini balst við Íslands strendur, aðrir túsund vunnu sær til lívsins uppihald í Íslandi í fimmtiárunum, tá ið hóttafall var komið á okkara egnu fiskivinnu. Tá fiskimørkini fyri 40 árum síðani vórðu flutt út, og stórbroytingar komu í alt fiskivinnumynstrið í Norðuratlantshavi, sýndu íslendingar seg eisini sum okkara sonnu vinir og brøður.

Og fyri bara nøkrum fáum mánaðum síðan kendu vit her í Føroyum aftur fløvan av okkara trúgva vinalagi og góða grannalagið. Eftir herviligu jólaódnina tóku íslendingar stig til at savna pening saman til okkara bjargingarfeløg. Eg vil vegna landsstýrið enn einaferð takka tykkum íslendingum hjartaliga fyri tað.

**Harra forseti, og frú Eliza**

Tygum eru triði forseti Íslands, sum kemur á almanna vitjan í Føroyum. Tað eru 30 ár síðan, vit fyrstu ferð fingu almenna forsetavitjan úr Íslandi, tá ið Vígdis Finnbogadóttir vitjaði oyggjarnar.
Allir teir føroysku miðlarnar vóru í 1987 á einum máli um, at dámliga medferðin, stóra vitanin og stóri áhugin hjá Vígdis Finnbogadóttir í okkara mentan bergtók alla tjóðina.
Ikki minst børnini vóru hugtikin, tí hon tók sær góðar stundir til at práta við tey kring alt landið, skrivaðu bløðini.

Eg má siga, sum tað er. Persónliga haldi eg meg síggja fleiri av somu eyðkennum á forsetavitjanini hesaferð. Tygum eru ein sera dámligur og stuttligur maður, ein vitandi maður og ikki minst ein mentaður maður. Seinastu dagarnar havi eg eisini varnast, hvussu væl føroyingum kring landið dáma tína løttu framferð.

Undir vitjanini fyri 30 árum síðan vísti Vígdis Finnbogadóttir fleiri ferðir á, at tað var sera týdningarmikið, at *"elligomlu vinabondini millum londini vórðu styrkt og knýtt enn fastari"*.

Eg kann ikki annað enn taka undir við boðskapinum hjá Vígdis Finnbogadóttir. Tað er mín vón, at vit við hesari vitjanini hava gjørt okkara til, at "elligomlu vinabondini eru styrkt og enn fastari knýtt".

Takk fyri!

Aksel V. Johannesen
løgmaður.